## VEÐRIÐ



Petur Skeel Jacobsen, veðurfrøðingur greiðir frá um veðrið




**Veðrið í morgin:**
Strúkur í vindi ella hvassur vindur av landsynningi og um middagsleitið regn. Seinnapartin minni vindur av suðri og yvirhøvur turt og sólglottar, men mjørkaflókar. Hitin millum 9 og 12 stig.




**Veðrið leygardagin:**
Gul til stívt andøvsgukl av landsynningi, seinnapartin upp í ein strúk. Eitt skifti regn, annars turt og sólglottar. men mjørki í støðum. Hitin millum 10 og 13 stig.




**Veðrið sunnudagin:**
Andøvsgul upp í ein strúk av landsynningi og eystri og yvirhøvur turt og sólglottar. Hitin millum 10 og 13 stig.

**Veðrið mánadagin og týsdagin:**
Mánadagin upp í ein strúk av eystri, týsdagin minni vindur. Yvirhøvur turt og sólglottar og hitin millum 9 og 13 stig.

## DAGSINS FØROYINGUR

# »Um summarið vísi eg Føroyar fram, og restina av árinum royni at eg ansa eftir teimum«

**Sámal Bláhamar rekur tora.fo og enjo.fo, sum eru tvær heimasíður, við heilt hvør sínum endamálið**

*Rólant Waag Dam*
*rolant@sosialurin.fo*



*– Sámal gleðir seg til ferðafólkini koma*

*Mynd: Alfie Haraldsen*

**■ Hvat er tora.fo?**
– Tora.fo er ein heimasíða, har ein og hvør kann koma og bíleggja túrar í summarhálvuni. Eg eri sum oftast guide, og so havi eg ein sjafør aftrat mær. Vit hava eina fasta skrá, og hvør dagur hevur sín túr.

**■ Verður tú ongantíð troyttur av hesum?**
– Nei, als ikki! Eg plagi at siga, at Føroyar eru heimsins besta land at vísa fram. Vit hava so væl útbygt samferðslunet, sum bara bíðar eftir okkum í ferðavinnuni at vísa fram

**■ Hvussu so tá veðrið verður ringt?**
– Tað heldur okkum ikki aftur. Tað hendir seg meiri enn so, at veðrið er ringt og vindur er, men so kanst tú altíð lova ferðafólkunum, at tað einasta sum er sikkurt og vist, er, at veðrið verður betri. Og tað passar altíð!

**■ Hvat er enjo.fo?**
– Enjo er tað, sum eg takist við vetrarhálvuna. Enjo er reingerðarvørur sum verja umhvørvið. Í mun til vanligar reingerðarvørur, so brúka vit reingerðartevjur, sum vísir seg at vera minst líka gott, um ikki betri

**■ Er nakar felagsnevnari fyri báðar heimasíðurnar?**
– Á ein hátt ber tað væl til at siga, at síðurnar báðar hava ein felagsnevnara ella hanga saman. Tí um summarið vísi eg Føroyar fram fyri ferðafólkum, meðan eg restina av árinum royni at halda tær reinar og varðveita tær. Og endamálið við tí heila er, at Føroyar skulu vera tað landið í heiminum, sum brúkar fægst kemikaliir per íbúgva. Tað hevði verið eitt vørumerki, sum vildi nakað

**■ Hvørjum vil tú heilsa?**
– Konu míni, Tórharda, sum er í Enjubásinum á sølustevnu á Tvøroyri, og okkara 10 ommu- og abbabørnum, sum vit eru so errin av

### Hitalagið kring knøttin

| | |
|---|---|
| Illulisat | -- |
| Nuuk | -2 |
| Qaqortoq | 3 |
| Ammassalik | 7 |
| Saint John's | -- |
| Halifax | -- |
| Reykjavík | 10 |
| Seyðisfjørður | 5 |
| Tórshavn | 7 |
| Lerwick | 10 |
| Aberdeen | 12 |
| London | 16 |
| Tromsø | -- |
| Bergen | 10 |
| Oslo | -- |
| Stokkhólm | 14 |
| Keypmannah. | 15 |
| Helsinki | 16 |
| Moskva | 20 |
| Berlin | 21 |
| Warzawa | 17 |
| Kiev | 19 |
| Bukarest | 16 |
| Paris | 23 |
| Madrid | 19 |
| Róm | 22 |
| Malorca | 22 |
| Athen | 17 |
| Malta | 19 |
| Tunis | 27 |
| Beijing | 19 |
| New Dehli | 38 |
| Bangkok | 36 |
| Jakarta | 28 |
| Sydney | 20 |
| New York | 18 |
| Miami | 25 |
| Los Angeles | 16 |
| Meksikobýur | 21 |
| Panama | 33 |
| La Paz | 11 |
| Rio de Janeiro | -- |
| Buenos Aires | 18 |

### LUFTTRÝSTIÐ




**Í gjár:**
Eitt lágtrýst, 991 hPa. vestan fyri Írland fer spakuliga í landnyrðing. Brúgvalagið haðani verður yvir Føroyum fríggjadagin.




**Í dag:**
Lágtrýstið í útsynning úr Føroyum fer norðureftir og brúgvalagið við Føroyar fer í landnyrðing.

### HITALAGIÐ




Hitalagið mált frá 3/5 kl. 06⁰⁰– 4/5. 06⁰⁰. Hitin í gjár: 8,5°
Minsti hiti máldur í mai: -3,0° - Mesti hiti máldur í mai: 19,7°

### AVFALLIÐ




Avfallið: 3,0 mm – mált frá 3/5 kl. 06⁰⁰– 4/5 kl. 06⁰⁰
Avfallið higartil í mai: 13,2 mm

### VESTFALLSKYRRINDI

5. mai — Fyrra kvarter
7. mai — Mánin longst frá jørðini

Kelda. Álmanakkin 2006

| Dagur | Suðuroyar-/ Vágafirði fp. | sp. | Skúvoyar-/ Skopunarfirði fp. | sp. | Hestfirði/ Sundalagnum fp. | sp. | Vestmannasundi fp. | sp. | Mykinesfirði fp. | sp. | Nólsoyarfirði fp. | sp. | 2 fj. í LS úr Mjóvanesi fp. | sp. | Leirvíksfirði/ Haraldssundi fp. | sp. | Kalsoyar-/ Svínoyarfirði fp. | sp. | Hvannasundi fp. | sp. | Fugloyarfirði fp. | sp. |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| 4. mai | 00.36 | 12.59 | 11.59 | - | - | 12.14 | 02.36 | 14.59 | 03.36 | 15.59 | 11.14 | 23.37 | 10.14 | 22.37 | 00.51 | 13.14 | 01.51 | 14.14 | 00.21 | 12.44 | 01.36 | 13.59 |
| 5. mai | 01.22 | 13.57 | 00.22 | 12.57 | 00.37 | 13.12 | 03.22 | 15.57 | 04.22 | 16.57 | - | 12.12 | 11.12 | 23.48 | 01.37 | 14.12 | 02.37 | 15.12 | 01.07 | 13.42 | 02.22 | 14.57 |
| 6. mai | 02.33 | 15.07 | 01.33 | 14.07 | 01.48 | 14.22 | 04.33 | 17.07 | 05.33 | 18.07 | 00.48 | 13.22 | - | 12.22 | 02.48 | 15.22 | 03.48 | 16.22 | 02.18 | 14.52 | 03.33 | 16.07 |
| 7. mai | 03.41 | 16.00 | 02.41 | 15.00 | 02.56 | 15.15 | 05.41 | 18.00 | 06.41 | 19.00 | 01.56 | 14.15 | 00.56 | 13.15 | 03.56 | 16.15 | 04.56 | 17.15 | 03.26 | 15.45 | 04.41 | 17.00 |

I EINUM SAMFELAG HAR TEY VEIKASTU HAVA TAÐ GOTT, HAVA ØLL TAÐ GOTT

WWW.JAVNI.FO

JAVNI



**Vika 17 – 30. apríl**

1. Centrum:
**58 - 73 - 23 - 02 - 60 - 66 - 29 - 45 - 51**

1. Ramme:
**31 - 67 - 16 - 44 - 10 - 71 - 03 - 63 - 17 - 61 - 37 - 24 - 08 - 26 - 06 - 22 - 11 - 28 - 14 - 68 - 01 - 04 - 74 - 36 75**

Fuld plade:
**41 - 34 - 62 - 05 - 32 - 35 - 50 - 70 - 54 - 52**

Fri spil: **BO_E_**

| | |
|---|---|
| Fuld plade: 1. pr. | **145.247,- kr.** |
| 1. Ramme: 2. pr. | **25.067,- kr.** |
| 1. Centrum: 3. pr. | **6.289,- kr.** |
| Ramme: 4. pr. | **316,- kr.** |
| Centrum: 5. pr. | **67,- kr.** |

Sosialurin tekur onga ábyrgd av møguligum villum



## TIPS 12 úrslit
**Vika 17 – 30. apríl**

| | | |
|---|---|---|
| 1. | AC Horsens - AaB | **2** |
| 2. | FC København - Brøndby | **x** |
| 3. | FC Midtjylland - Esbjerg | **x** |
| 4. | FC Nordsjælland - OB | **2** |
| 5. | Silkeborg - Viborg | **2** |
| 6. | AB - Køge | **1** |
| 7. | Fremad Amager - Lyngby | **2** |
| 8. | Herfølge - FC Fredericia | **1** |
| 9. | Randers FC - Vejle | **x** |
| 10. | ÿlstykke - Kolding FC | **1** |
| 11. | Br¯ndby 2 - Hvidovre | **1** |
| 12. | Slagelse - B 93 | **2** |

**Prognosa:**

| | |
|---|---|
| 12 rætt: | **Eingin/0,- kr.** |
| 11 rætt: | **17.877,- kr.** |
| 10 rætt: | **989 ,- kr.** |

Sosialurin tekur onga ábyrgd av møguligum villum

5 707265 100050 >